Kunngerðablaðið A

2023 Givið út 26. oktober 2023

Nr. 114 25. oktober 2023

**Kunngerð**
**um**
**handil við ethanoli til tekniska nýtslu**

Við heimild í § 4, stk. 2 og § 13, stk. 4 í løgtingslóg nr. 111 frá 20. oktober 2023 um innflutning, framleiðslu og sølu av rúsdrekka (Rúsdrekkalógin) verður ásett:

**§ 1.** Apoteksverkinum er loyvt at innflyta og selja ethanol til tekniska nýtslu og heilivágsframleiðslu.

**§ 2.** Sølan kann bert fara fram, tá ið keyparin leggur fram skrivliga váttan frá Arbeiðs- og bruna-eftirlitinum, ið sigur, at neyðugt er at nýta ethanol til ta í § 1 nevndu nýtslu og hvørja nøgd.

**§ 3.** Niðanfyri nevndu stovnum nýtist ikki at leggja fram ta í § 2 nevndu váttan, um so er, at eitt starvsfólk á stovninum við leiðsluábyrgd biður um ávísa nøgd frá apoteksverkinum við skrivligari váttan um, at stovnurin skal nýta ethanolið til ta í § 1 nevndu nýtslu:

1) Apoteksverkið.
2) Sjúkrahúsverkið.
3) Skúlar.
4) Heilsufrøðiliga starvsstovan.
5) Føroya Náttúrugripasavn.
6) BIO-FAR verkætlanin.

**§ 4.** Stovnar sambært § 3 skulu skráseta, hvussu ethanolið er nýtt.

**§ 5.** Tær í §§ 2 og 3 nevndu váttanir skal apoteksverkið skjalgoyma í 2 ár.

**§ 6.** TAKS hevur eftirlit við, at ethanolið verður nýtt til ætlaða endamálið.

**§ 7.** Brot á hesa kunngerð verður revsað við sekt.

**§ 8.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Løgmálaráðið, 25. oktober 2023

**Bjarni Kárason Petersen (sign.)**
landsstýrismaður

/ Nella Festirstein (sign.)